## Íslendingar skylda nógv

Seðlabanki Íslands ávarar nú um, at nógvir íslendingar kunnu fáa ilt við at gjalda síni lán, tí rentan hækkar, samstundis sum húsavirðið fellur. Ein nýggj uppgerð hjá bankanum vísir, at nógvir íslendingar skylda munandi meiri nú enn fyri bara fáum árum síðani. Í árunum frá 1999 til 2005 vóru tað 7.000 pør, sum skyldaðu meiri enn tað, tey áttu. Tað talið er nú 8.500, og samstundis er talið á einstaklingum í somu støðu økt úr 8.500 upp í 25.000.



*Dávið Oddsson er stjóri í íslendska Seðlabankanum (Mynd: Morgunblaðið)*

## Landsstýrið skal frá

Í Nuuk hava nógvir veljarar vent landsstýrissamgonguni bakið, eftir at tað kom fram, at landsstýrið hevði selt leiðandi politikarum og embætismonnum almenn hús fyri lítið og lætt. Ein løgfrøðingakanning hevur seinni staðfest, at sølurnar vóru ólógligar, og ein onnur frágreiðing er á veg. Men veljararnir í Nuuk hava tikið støðu, tí ein nýggj meiningakanning vísir, at heili 63 prosent av veljarunum har halda, at landsstýrið eigur at fara frá.

Jesper Theilgaard, veðurmaður á DR:

# – Størstu veðurlagsbroytingar verða ikki at merkja í Føroyum

**CO2-útlátið var høvuðsevnið í Miðlahúsinum í Vágsbotni í gjárkvøldi. Umhvørvistiltakið var ein partur av umhvørvisvikuni hjá kommununi, sum er hesa vikuna. Jesper Theilgaard, veðurmaður á Danmarks Radio, helt fyrilestur um CO2-útlátið kring heimin og tess ávirkan á Føroyar. Fýra stuttfilmar um umhvørvið vóru vístir, sum framhaldsskúlanæmingar høvdu gjørt til endamálið. Bárður Johannesen spældi til tiltakið**




*Jesper Theilgaard, veðurmaður á Danmarksradio, helt fyrilestur í Miðlahúsinum í Vágbotni í gjárkvøldið.*

*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna skipaði í gjárkvøldið fyri einum umhvørvistiltaki í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn sum ein partur av umhvørvisvikuni. Tiltakið byrjaði við fýra stuttfilmum, sum tveir framhaldsskúlaflokkar høvdu gjørt til endamálið í samstarvi við Ikon og Klippfisk. Tey ungu høvdu fingið loyvi at filma í ein dag og fingu síðani tveir dagar at klippa og redigera. Filmarnir eydnaðust sera væl. Ruskløgreglan fangaði fólk, ið tveitti rusk á gøtuna.

– Tak teg saman, og – Ger tín part, var millum annað sagt í filmunum. Moralurin var greiður, og boðskapurin kom fram. Filmarnir vístu, hvussu hvør einstakur borgari kann vera við til at verja umhvørvið. Filmarnir eydnaðust sera væl.

Jesper Theilgaard helt fyrilestur um CO2-útlátið kring allan heimin, og hvussu útlátið m. a. ávirkar Føroyar. Jesper Theilgaard er veðurmaður á Danmarks Radio, men hevur eisini starvast í Føroyum, tá ið hann var á flogvøllinum vesturi í Vágunum í 1979. Føroyar eru tískil ikki heilt ókendar fyri hann. Jesper Theilgaard greiddi frá, hvussu CO2-útlátið kann ávirka Føroyar.

- Størstu veðurlagsbroytingar vera ikki at merkja í Føroyum, so leingi Golfstreymurin enn drívur um Føroyar, greiðir hann frá.

- Djúpri lágtrýst og hægri vindmegi fara vit tó at merkja um eystara partin av Atlantshavinum.

Størsti trupulleikin hjá Norðurlondum verður, um allur ísurin á Norðpólinum bráðnar. 1½ millión fermetrar av ísinum á Norðpólinum bráðnaði á sumri í 2007. Ísurin er tó komin aftur í vetur, men Jesper Theilgaard greiðir frá, at hesin ísurin er nýggjur og bráðnar tískil lættari enn gamal ísur. Júst hetta vísir, hvussu viðbrekið umhvørvið er, og hvørjir vandar vit liva við, um vit ikki eru tilvitað um, hvussu vit fara við okkara umhvørvið.

Jesper Theilgaard greiddi frá teimum ymisku ástøðunum um orsøkina til Global Warming, sum eru komnar seinastu árini.

– Tó eri eg vísur í, at CO2-útlátið hevur størstu ávirkanina, sigur hann.

Annika Berg er verkætlanarleiðari á umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu og fyriskipari av umhvørvisvikuni. Hettar er triðja árið, tiltakið er fyriskipað. CO2-útlat er evnið á umhvørvisvikuni í ár. Endamálið er at kunna føroyingum um veðurlagsstøðuna og greiða teimum frá, hvussu tey kunnu hjálpa at skerja CO2-útlátið.

– Politikarar tosa málið hjá fólkinum, og tosar fólkið við atliti til umhvørvið, so gera teir tað eisini, sigur Annika Berg.

### CO2-útlát:

**Orkuútgerð: 25,9 %**
**Flutningur: 13.1 %**
**Ídnaður: 19.4%**
**Landbúnaður: 13,5%**
**Burturbeining: 2,8%**
**Skógbúnaður: 17,4%**

### Veðurloftið:

**Køvievni: 78%**
**Súrevni: 21%**
**Annað: 1%**